**Merkið roknskaparskjølini við roknskaparári**

Nú ið ársskiftið 2023/2024 er beint fyri stavn, verður heitt á stovnarnar, ið senda Gjaldstovuni skjøl at bóka, um at gera gjaldstovuna varuga við, hvørji skjøl skulu bókast á fíggjarárið 2023.

Tá ið farið verður um ársskiftið 2023/2024, verður heitt á stovnarnar, ið senda gjaldstovuni skjøl at bóka, um at eyðmerkja roknskaparskjølini við ávikavist ”2023” og ”2024”.

Er rokning, sum viðvíkur 2024, ljóslisin við ”GL Date” í 2023 – tí fakturadagfestingin er í 2023 – ber til at broyta ”GL Date” til at vera 01-24, so rokningin kortini verður bókað á fíggjarárið 2024. Og umvent - rokning, sum viðvíkur 2023, ljóslisin við ”GL Date” í 2024 – tí fakturadagfestingin er í 2024 – ber til at broyta ”GL Date” til at vera 12-23 ella 13-23, so rokningin kortini verður bókað á fíggjarárið 2023.